## DAGSINS MEINING

### Fótbóltssambandið 25 ár

Týsdagin tann 13. januar vóru 25 ár síðan Fótbóltsamband Føroya varð sett á stovn. Hetta er ein stór hending, og øll kunnu bert vera samd um, at týdningurin av FSF ikki kann yvirmetast. Líta vit aftur á hesi 25 árini, so má ásannast, at føroyskur fótbóltur hevur ment seg ómetaliga nógv. Hesi árini er nógv hent innan fótbólt og alt, sum hevur við hesa ítrótt at gera. Vit hava fingið graslíkisvallir og grasvallir, vit eru komin upp í altjóða fótbóltssamstarv, og føroyskur fótbóltur hevur fingið altjóða viðurkenning.

Hetta hendi, tá Føroyar fingu sjálvstøðugan limaskap í altjóða fótbóltssamgonguni FIFA, og vit sama ár komu upp í UEFA. Við hesum vórðu Føroyar viðurkendar sum fótbóltstjóð, og sigast má, at FSF og føroysku leikararnir hava gjørt sítt ítarsta til at liva upp til okkara luttøku í altjóða samstarvinum. Føroyar hava tikið lut í EM og HM undankappingum. Hugsa vit um landsins stødd og tilfeingi er tað ikki ov nógv sagt, at okkara leikarar hava vunnið sær miklan heiður í nógvum av hesum kappingum. Dysturin í Landskrona setti Føroyar á fótbóltsheimskortið, og har hevur føroyskur fótbóltur verið síðan.

Tað eigur í sambandi 25 ára merkisdagin eisini at verða nevnt, at virksemið hjá yngru landsliðunum er í vøkstri og sterkari menning. Hetta boðar frá góðum fyri framtíðina hjá Føroyum sum fótbóltstjóð. Eisini kvinnufótbólur er í sterkari menning og fara vit heilt víst at síggja stór úrslit á hesum øki í framtíðini.

Tað er einki at ivast í, at FSF eigur ein stóran part av æruni fyri tí framburði og tí menning, sum hevur verði føroyskum fótbólti fyri hesi seinastu 25 árini. Ein slík menning kann bert verða framd og tryggjað av einum sterkum og vælskipaðum felagsskapi við góðari leiðslu. Danir hava eitt orðatak, ið ljóðar nakað soleiðis: "Æres den, som æres bør." Tað er eingin ivi um, at FSF eigur stóra tøkk og stóran heiður uppiborið frá føroysku tjóðini. Leikarar okkara hava gjørt. Føroyar kendar um allan heim fyri tað góða. Leikarar, venjarar, FSF leiðslur og fyrisiting hava verið góð umboð fyri Føroyar. Hetta eiga landsins myndugleikar at viðurkenna og at taka til eftirtektar og eiga at stuðla fótbóltinum av øllum alvi. Vit ynskja FSF til lukku við merkisdegnum og góðan byr framyvir.

**Sosialurin**

## VIÐMERKINGAR

# Nýggjárssendingin / Ingeborg

**Meinhard Jacobsen**



Undirritaði varð boðsendur til at koma við í eini sending í Útvarpi Føroya. Evni, ið skuldi umrøðast, var kappingarførið hjá flakavinnuni á landi.

Her má verða komin misskiljing í, tí nakrar viðmerkingar.

Í sendingini vísti undirritaði á, at á Føroya Fiskavirking (FFV) eru vit glað fyri okkara starvsfólk og avrik teirra.

Við at økja um bruttokostnaðin við tí ferð, ið hevur verði tey seinastu 6 árini, verður hetta at seta so stór krøv til effektivitetin á útflutningsvinnuni, at henda ikki verður kappingarfør. Tá ið kappingarførið er fokið, fara arbeiðsplássini at hvørva, og torført verður at finna onnur arbeiðspláss (2.000 - 3.000) ístaðin.

Av hesi orsøk er neyðugt við at meta um skipanina einaferð enn. Hvussu vit kunnu kappast við onnur.

Tað verður ferð eftir ferð ført fram, at lønarhækkaninar eru uppetnar av kostnaðar -hækkanum (skatti, dýrari vørum og avgjøldum). So hesin leistur sær ikki út til at hava givið gott úrslit.

Tað, sum sendingin segði, var, at lok má leggjast á lønarvøksturin fyri alt samfelagið - bæði alment og privat.

Umráðandi er, at starvsfólkini ikki minka í realløn, (tí eins og sagt í Degi og Viku 05-01-2004 "okkara starvsfólk fáa ikki ov mikið"). Reallønin kann vaksa við einum skatta- og avgjaldslætta.

Fyri útflutningsvinnuna er tað ikki líka mikið um reallønin veksur við bruttulønarvøkstri ella við skatta- og avgjaldslættan. Har er tað ein spurningur um lív ella deyð.

Fyri starvsfólkini er tað líkamikið. Eisini hevði hjálpt um innlendisveitarar og almennar tænastur høvdu verði altjóða kappingarførar.

Víst var á, at kostnaðarstøðið ikki bert er verkafólkið, men at tey oftast koma aftast í røðini, tá talan er um løn.

Tað almenna hevur økt sera nógv um virksemi bæði við íløgum og umsiting. Hetta hevur elvt til, at nógv fólk eru farin til tað almenna og aðrar ikki- útflutningsvinnur. Lønartrýstið er fyrst og fremst komið frá hesum. Hetta trýst hevur einki við fiskaprísir, kappingarføri, valuta v.m. at gera.

Í sendingini varð víst á, at við verandi gongd sær ikki gott út við kappingarførinum. Sagt var, at til verandi kostnaðarstøðið arbeiða nærum allir føroyingar ov seint til gera seg galdandi í kappingini. Hetta er galdandi fyri øll arbeiði og øll fólk alment sum privat.

Hetta sjónarmiðið førdi eg fram, og tað standi eg við.

Í Føroyum er tað so, at starvsfólkini í útflutningsvinnuni eru tey einastu, ið verða máld upp á sín effektivitet og eru helst tey, ið arbeiða mest fyri sína løn.

At ein ikki arbeiðir fyri sín kostnað, skal skiljast soleiðis, at um tú skalt útflyta vørur virkaðar í Føroyum, so er kostnaðurin her ov høgur samanborið við okkara grannar, fyri at okkara vørur kunnu kappast við teirra.

At trupulleikar eru við kappingarførinum er rættuliga sjónligt, við tað at flakavirkir liggja still, meðan stórar nøgdir av óviðgjørdum fiski fara av landinum.

Hvussu skjótt skal ein føroyingur arbeiða við verandi kostnaðarstøði, fyri at kostnaðurin fyri vøruna skal verða tann sami sum fyri ein granna ella útlending ?

Í flakavinnuni sær nøkurlunda soleiðis út:
1 Føroyingur skal arbeiða tað sama sum :
Ca. 1,5 Íslendari.
Ca. 1,9 Breti.
Ca. 50 Kinverjar.

Hetta er veruleikin.
Sí tekning!

Støðan lýst sum kapprenning millum grannar.

Hvør liggur best fyri ??

Hevur føroyingurin nakran møguleika ??.

Um vit ikki klára hesa ójøvnu kapping, hevur hetta einki við dugnaloysi, leti ella ikki at vera góð arbeiðskraft at gera. Hesar grundgevingar geva ikki meining.

Undirritaði hevur sagt og sigur, at á FFV eru vit væl nøgd við okkara starvsfólk og teirra arbeiði. Talan er um eitt gott avrik, men at byrðarnar, ið nú verða lagdar á starvsfólkini, eru nærum órealistiskar at klára.

Spurdur, um FFV heldur vilja hava útlendingar enn føroyingar, svaraði undirritaði, at vit vilja hava kvikar hendur til arbeiðis, helst føroyingar, og um vit ikki kunnu fáa nokk av føroyingum, so mugu vit innflyta tað, sum manglar í. Á FFV hava vit góðar royndir við føroyingum.

Á FFV er ikki kannað, hvør er kvikari føroyingar ella útlendingar. Hetta hevur ikki verði aktuelt og verður tað heldur ikki. Her verða øll starvsfólk viðfarin eins.

Undirritaði er stjóri á FFV og hevur ábyrgdina av, at fyritøkan gongur væl, og at starvsfólkini hava tað gott, og henda ábyrgd verður ikki løgd á onnur.

Gingið verður út frá, at Ingeborg og aðrir fakfelagsleiðarar eisini eru áhugaðir í, at arbeiðsplássini verða støðug og góð gjøgnum komandi torførar tíðir. Tí verður sagt frá, at verandi gongd í samfelagnum má broytast soleiðis at hetta verður møguligt.




**Sosialurin**

**Sosialurin**
Stovnaður: 1927
**Ábyrgdarblaðstjóri:** Jan Müller jan@sosialurin.fo
**Blaðstjóri:** Eirikur Lindenskov eirikur@sosialurin.fo
**Fíggjarleiðari:** Jákup Mørk jakup@sosialurin.fo

**Marknaðardeild:** lysing@sosialurin.fo
Finnbjørg Nattestad finnbjorg@sosialurin.fo
Durita Simonsen durita@sosialurin.fo

**Blaðfólk:**
Áki Bertholdsen aki@sosialurin.fo
Eyðun Klakstein eydun@sosialurin.fo
Edvard Joensen edvard@sosialurin.fo
Heri á Rógvi heri@sosialurin.fo
Ingrid Bjarnastein ingrid@sosialurin.fo
Vilmund Jacobsen vilmund@sosialurin.fo
Solby Eliasen solby@sosialurin.fo
Dagfinn Olsen dagfinn@sosialurin.fo
Ingi Rasmussen ingi@sosialurin.fo
Magnus Gunnarsson maggi@sosialurin.fo

**Ítróttur:**
Jákup Mørk jakup@sosialurin.fo

**Myndamenn:**
Álvur Haraldsen alvur@sosialurin.fo
Jens Kristian Vang jensk@sosialurin.fo

**Sosialurin í Norðoyggjum:**
Postsmoga 231
Nólsoyar Pálsgøta 1, 700 Klaksvík
tel. 458686 fax 458687
e-post: klaksvik@sosialurin.fo

**Sosialurin í Suðuroy:**
tel. 375364 fax 375464
tel. 220727
e-post: aki@sosialurin.fo
e-post: dagfinn@sosialurin.fo

**Sosialurin í Eysturoy:**
Postsmoga 143, Saltangará
tel. 447820 fax 449520
tel. 228909
e-post: vilmund@sosialurin.fo

**Sosialurin í Vágum:**
360 Sandavágur
tel. 333820, 220507 fax 333720
e-post: edvard@sosialurin.fo
e-post: vagar@sosialurin.fo

**Uppseting/prent:**
Uppseting: Hestprent
Prent: Prentmiðstøðin

**Útgevari:**
Sp/f Sosialurin

**Avgreiðsla:**
Mán.-frí. 8-16
Argjavegur 26,
Tel. 341800, Fax 341801

**Postadressa:**
Postboks 76, 110 Tórshavn

**E-mail:**
post@sosialurin.fo
lysing@sosialurin.fo
lysingartorg@sosialurin.fo
varp@sosialurin.fo

Blaðið verður prentað mánadag-fríggjadag klokkan 14[00]

**Lýsingar**

| Freistir: | Tekstlýsingar | Størri lýsingar | Lýsingartorgið | Heilsanir |
|---|---|---|---|---|
| Týsdagsblaðið | Mán.kl. 10 | Frí. kl. 15 | Frí. kl. 12 | Frí. kl. 12 |
| Mikudagsblaðið | Týs. kl. 10 | Mán. kl. 15 | Mán. kl. 12 | Mán. kl. 12 |
| Hósdagsblaðið | Mik. kl. 10 | Týs. kl. 15 | Týs. kl. 12 | Týs. kl. 12 |
| Fríggjadagsblaðið | Hós. kl. 10 | Mik. kl. 15 | Mik. kl. 12 | Mik. kl. 12 |
| Leygardagsblaðið | Frí. kl. 10 | Hós. kl. 15 | Hós. kl. 12 | Hós. kl. 12 |

Størri lýsingar, sum nógv arbeiði stendst av, mugu vera inni í góðari tíð og áðrenn ásettu freistir.
Framíhjápláss má umbiðjast í góðari tíð.

**Stødd:**
Ein heil síða í Sosialinum er 254 mm breið og 346 mm í hædd. Breiddin á einum teigi er 39mm og rúmið millum teigarnar er 4mm.

**Innsent tilfar**
Fult navn skal vera undir innsendum tilfari. Innsendar greinar, har blaðleiðslan ikki er kunnað um bústað og telefonnummar, verða ikki settar í blaðið.



# NØVN Í VIKUNI

Telefon 341800 - Fax 341801 - Fartelefon 216135
e-mail: maggi@sosialurin.fo

Á hesum síðum bera vit tíðindi um merkisdagar, so sum rundar føðingardagar, brúdleypsdagar, starvssetanir o.t.

Benny Ejdesgaard:

## Nýggjur leiðari í mótahandlinum Deres



*Benny Ejdesgaard saman við starvsfólkunum í Deres. Tær sum arbeiða í handlinum eru f.v. Ansa Strøm, Marjun Hansen og Hildigerð Priess*

*Mynd: Jens Kristian Vang*

Fyri jól 2003 bleiv Benny Ejdesgaard í Havn settur sum leiðari í mótahandlinum Deres í SMS.

Benny hevur arbeitt sum sølumaður í ymiskum fyritøkum sum t.d. hjá Frants Restorff og Damfar. Eisini arbeiddi hann sum sjálvstøðugur í nøkur ár.

Síðan nýggja Norrøna kom, hevur hann arbeitt sum shop-manager umborð, til hann nú tók við sum leiðari í Deres.

Benny sigur at leiðarastarvið í Deres er ein spennandi uppgáva. Deres er ein donsk handilsketa, sum hevur handlar í fleiri londum.

Føroya Fiskavirking:

## Starvsfólk á Tvøroyri heiðraði

**Herfyri vórðu 11 starvsfólk á Føroya Fiskavirking á Tvøroyri heiðraði. Felags fyri tey øll var, at tey høvdu arbeitt á virkinum í 25 ár ella meira**

Onkur var við frá byrjan í 1975, tá virkið lat upp undir navninum Tvøroyrar Flakavirki. Í 1993 bleiv virkið yvirtikið av Føroya Fiskavirking.

Starvsfólkini fingu blómur og ymsar gávulutir úr silvuri. Menninir fingu manchettknappar og konurnar fingu hálsband og okkurt annað.



*Fólkini eru frá vinstru: Niels Pauli Thomsen, Elisabeth Kambskarð, Esther Jacobsen, Mortina Samuelsen, Kim Thomasen, Joan Eidesgaard, Napoleon Nolsøe, Jonna Mortensen, Anton Johannesen, Johan Øster og Jóannes Petersen*

## Grøn vika og »Lægens bord« á Hotel Norð



**Mánadagin 26. januar til sunnukvøldið 1. februar verður Grøn Vika á Hotel Norð. Seinasta kvøldið verða verður fyrilestur, har læknin frá væl umtóktu sendingini "Lægens bord" luttekur**

**Tíðindaskriv**

Eins og fleiri ferðir seinnu árini skipa Sámal & Tórharda Bláhamar fyri Grønari viku. Hesaferð verður Grøna vikan á Hotel Norð.

Umleið 400 føroyingar hava luttikið á Grønari viku gjøgnum árini. Grønu vikurnar hava verið ávíkavist á hesum støðum: Hotel Vágum, Hotel Borg & Hotel Føroyum og á Runavíkar Sjómansheimi.

Hesaferð er matskráin frá nýggjastu matbókini Lætt & Leskiligt eftir Jóhonnu á Tjaldafløtti og Elisabeth Akursmørk.

Matgerðina stendur Hotel Norð fyri.

Kostnaður fyri hvønn er kr. 3.750,00 fyri alla vikuna.

Íroknað er: Matur, fyrilestur við »Lægens bord«, gisting í dubultkamari.

Eyka kostnaður fyri einakamar er kr. 1.000,00

Tilmelding fer fram á tlf. 31 43 53 & 31 55 05.

Ella á e-mail: torharda@post.olivant.fo

## 80 ÁR

Í dag, 15. januar verður Steingrím Poulsen, Skopun 80 ár. Vælkomst verður hjá soninum, Borgartún 3, Argir.

## Dagurin

**15. januar. Maurus,** deyður umleið 550. Var næmingur hjá tí mæta kleysturhøvdinga Benadikti úr Nursia, og fylgdi honum eftir sum abbati. Navnið merkir *blámaður.*

*William Heinesen varð føddur hendan dagin í 1900 og andaðist á Grækarismessu í 1991.*